


# Sølufólk til Betri pensjón

Vit sóknast eftir dugnaligum og framfýsnum starvsfólki til sølu og ráðgeving.

## Starvið

Vit bjóða eitt spennandi starv í nýggjari fyritøku við stórum ætlanum. Betri pensjón vil veita sínum kundum bestu pensjónina í landinum. Tú sleppur at arbeiða breitt, fært ávirkan og nógvar spennandi avbjóðingar. Arbeiðsuppgávan er at ráðgeva kundum okkara bæði persónliga og um telefonina. Tú skalt eisini hava framløgur fyri fyritøkum, fakfeløgum og kundum sum heild.

Hevur tú viðkomandi útbúgving ella royndir? Hevur tú til dømis starvast sum sølufólk ella hevur viðkomandi handilsútbúgving? So er tað tær, vit hava brúk fyri. Tað er umráðandi, at tú ert tænastusinnað/ur, hevur góð samráðingarevni og hevur handilsligan hugburð. Tú skalt vera fyrikomandi, duga væl at samstarva, at arbeiða sjálvstøðugt og í toymum.

## Løn- og setanarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast tilber, og lønin verður avtalað í mun til royndir og førleika. Tú fært sjálvandi eisini eina sera góða pensjónsskipan.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Mortan Poulsen, stjóra, á tel 345502 ella teldupost mp@betri.fo.

## Umsókn og freist

Umsóknir við lívsgongdarlýsing (CV) skulu vera okkum í hendi innan 20. november. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Send umsóknina til:
Betri pensjón, Starvsfólkadeildin
Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn

www.betri.fo

Betri pensjón




*Olaf á Stongunum, sum er formaður í valnevndini fyri fólkatingsvalið í Føroyum, heldur ikki, at nevndin hevði nakran møguleika at fyribyrgja tekniska trupulleikanum í uppteljingarskipanini hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið*

# - Keðiligt, men eitt hendiligt óhapp

**Eitt valkvøld er altíð hektiskt, og tað er forbanka keðiligt at fáa ein slíkan tekniskan feil at dragast við, sigur formaðurin valstýrinum fyri fólkatingsvalið, Olaf á Stongunum, um kiksaðu uppteljingina í Kringvarpinum**

FÓLKATINGSVAL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Alt ríkið lá í andaleypi í gjár og bíðaði eftir uppteljingini av fólkatingsvalinum, sum dróg álvarsliga út í Kringvarpinum, tí tekniska skipanin breyt saman.

- Hatta er ein skipan, sum Kringvarpið sjálvt hevur ábyrgdina av og goldið, og tí er ikki tað stóra hjá okkum at gera. Vit hava altíð havt álit á tí, sum stovnurin hevur gjørt fyri okkum, so eg meti tað sum hendi í gjárkvøldið sum eitt hendiligt óhapp, sigur formaðurin í valstýrinum fyri fólkatingsvalið í Føroyum, Olaf á Stongunum.

Spurdur um ikki valnevndin hevur evstu ábyrgdina, sigur formaðurin, at jú, tað hevur nevndin sjálvandi, men tá tað er teknikkur, sum ikki vil, er ikki tað stóra at gera í eini slíkari løtu enn at vóna, at tey sum hava skil á tí fáa tað rætta.

Uppteljingin var helst ein tíma seinkað orsakað at teknisku trupulleikunum. Roknað varð við endaliga úrslitinum um 22-tíðina, men ikki fyrr enn klokkan 22:59 var úrslitið greitt. Longi sá út til, at tað fór at vera Fólkaflokkurin, sum fór avstað við næsta kandidatinum, men hetta var orsakað av, at nógvar sambandsatkvøður vóru horvnar í teknisku skipanini.

Valnevndin fær í dag allar atkvøðurnar latnar upp í hendi og fer nú undir finteljingina, sum fer fram á Hotel Hafnia. Úrslitið skal fyriliggja í seinasta lagi komandi týsdag.